

# Oljurisi vekir ans í Skotlandi

**Jan Müller**

20.10.2015 - 16:12

Oljan.fo

Øll minnast vit yvirskriftirnar í heimspressuni, tá risastóri boripallurin West Hercules í fjør legði leiðina inn á Skálafjørðin. Hetta var mett sum einki minni enn ein sensatión ikki minst sæð við føroyskum vinnueygum. Men eisini í oljugrannatjóðunum Skotlandi og Norra varð nógv gjørt burtur úr, at ein so stórur oljupallur varð komin inn á føroyskan fjørð at verða umvældur.

Yvirskriftirnar í skotskum oljubløðum í hesum døgum minna ikki sørt um tær føroysku í fjør, nú ein av systurpallunum hjá West Hercules, nevniliga West Phoenix, sum boraði Anne Marie brunnin undir Føroyum í 2010 fyri oljufelagið ENI, nú hevur kastað akkerð á skotskum firði. Undir yvirskriftunum: “Make way for a giant: Cromarty Firth gives shelter to its biggest ever rig” og “Giant to Skotland” er ikki sørt av ovfarakæti at merkja, nú tann størsti oljupallurin nakrantíð hevur lagt leiðina inn á tann skotska “Skálafjørðin”, Cromarty Firth, um ein so kann siga.

Hóast skotar eru vanir við at hýsa oljupallum á teirra firðum, so setir hesin met í stødd við sínum meira enn 35.000 tonsum. Herald Tribune og Oil Voice, sum brúka nógv pláss uppá oljusøgur, skriva í dag, at tað er hugaligt fyri Skotland, at eigararnir av pallinum, North Atlantic Drilling, teir somu, sum eiga West Hercules, ið lá á Skálafjørðinum, hava avgjørt at parkera pallin í Skotlandi.

Ein høvuðsorsøkin til hetta er uttan iva tann, at pallurin hevur arbeitt vestan fyri Hetland. Hann hevur fingið nýggjan sáttmála við franska oljufelagið Total og skal fara undir ta uppgávuna í mars næsta ár. Tað verður eisini vestan fyri Hetland. Tvs. at hann kemur á liggja fyri akkerð á skotska firðinum í nærum hálvt ár.

Men munur er tó á pallum. West Hercules, sum lá á Skálafjørðinum í ein mánað, er nógv størri enn West Phoenix. Hann er 40.000 tons, 116 metrar langur og 96 metrar breiður. West Phoenix, sum nú setir støddarmet á skotskum oljufirði, er 35.000 tons, 83 metrar langur og 71 breiður.

Teinurin frá oljuøkinum vestan fyri Hetland til Cromary Firth í Skotlandi er umleið tann sami sum inn á Skálafjørðin í Føroyum.





The oil rig, West Phoenix.







Lodge
Ardross
Kildary
Balintore
Delny
Nigg
Alness
A9
Cromarty Firth
Cromarty
Evanton
Navity
Dingwall
Fortrose
Nairn
Auldearn
Dyke
Conon Bridge
A9
A835
Munlochy
Moray Firth
A96
Cawdor
Logie
Muir of Ord
North Kessock
Culloden
Beauly
Inverness
Westhill
Ferness
Daltra
Kiltarlity
Banchor
Daless
Dava


Tain
Cadboll
A9
Findhorn
Kinloss
A96
Elgin
Forres
Dingwall
Fortrose
Nairn
A96
Muir of Ord
A9
A96